# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein heilsan til fráfarna fiskimannafelagsformannin Óla Jacobsen

OSMUND JUSTINUSSEN



*Bjart var títt skygni,*
*skarpt títt vit,*
*tryggur tú tyktist í sessi.*
*Snøggliga komu so boðini :*
*»Flyt«,*
*klokkurnar ringja til messu.*

Hesa yrking gjørdi Janus Djurhuus, tá M. A. Jacobsen var farin um sýnina.

Nú eg setti meg at skriva nøkur orð um Óla Jacobsen, runnu mær hesi orð í huga og haldi eg, at hetta ørinidi hóskar so væl til Óla og tað verk, sum hann hevur útint sum um fiskimannafelagsformaður í 36 ár. Nú »klokkurnar ringdu út« hjá Óla í Fiskimannafelagnum haldi eg, at Óli hevur uppiborið eina stóra tøkk fyri tað megnar avrik, sum hann hesi mongu ár gjørdi fyri føroysku fiskimannastættina og fyri alt taqð føroyska samfelagið. Óli vísti frá heilt ungum árum av bjart skygni og skarpt vit, og hevur hetta verið teim føroysku fiskimonnunum og øllum okkara samfelag til stórt gagn.

Eg var staddur uttanlands, tá eg frætti, at Óli stóð ikki mát, nú veljast skuldi formaður av nýggjum í fiskimannafelagnum. Eg má siga, at eg varð ikki sørt bilsin, tá eg hoyrdi úrslitið.

Tó, eftir at hava hugsað eina løtu, so ásannaði eg: Ja, nú hevur demokratiið enn einaferð talað. Hetta løgna fyribrigdi við menniskjanum, at ein velur eftir tí, sum ein fær lovað, og gloymir, tað sum ein hevur fingið. Við Óla sum formanni í 36 ár hevur fiskimannafelagið ment seg til at vera eitt felag, sum hevur størstu virðing ímillum manna og ikki minst uttanlands, »har profeturin ikki býr«, er fiskimannafelagsformaður rættiliga høgt í metum og hevur verið ein framúr góður ambassadørur fyri fiskimannastættina og fyri okkara samfelag sum heild.

Óli hevur hesi mongu ár sum formaður í felagnum ótroyttiligur arbeitt fyri sínar limir, og hansara gløgga vit hevur verið við til at forða fyri mongum, sum kundi verið til bága fyri fiskimannin á mongum økjum, í lógarsmíði, á skatta-, studning- og tryggingarøkinum o. ø.

Eg havi hoyrt fortalt um eina talu, sum gamli Julius á Viðareiði sáli helt einaferð í 1950'unum í Klaksvík, tá ið tíðirnar vóru truplar. Hann fór upp á talarastólin í Bethesta eftir eina lagna tøgn, og teksturin til taluna var »Abraham var ikki bardagamaður«. Hesa taluna mintust áhoyrararnir leingi.

Eg havi kent Óla sum fiskimaður og sum reiðari, og siga má eg sum Július á Viðareiði á sinni, at Óli hevur ikki veirð bardagamaður, tó at hann hevur ikki ivast í at sagt sínar meiningar, tá tað var neyðugt, bæði í skrivt og talu. Men tó hevur hann vunnið ótrúliga nógvar sigrar, og væl hevur skorist. Hann kann tí við stórum sóma leggja frá sær eftir vælgjørt verk.

Nú hann leggur frá sær, kann hann spenna bringuna fram, eins og Dia í Vestmanna plagdi at gera undir samráðingum við Reiðarafelagið, tí Óli eftirletur sær bestu sáttmálar, sum nakrir fiskimenn í heiminum hava. Hetta hevur Óli klárað uttan at koyra samfelagið út í verkfall og vónloysi, so nú ið hann er avmynstraður, nýtist hon um ikki at ganga ígjøgnum fjøruna til hús. - Væl gjørt!

Óli hevur havt serlig evni til at yvirtala reiðararnar undir samráðingum. Tað er sjón fyri søgn. Hann er ongantíð komin við krøvum, sum hava verið meingsleys, men hevur tó í flestu førum vunnið nakað, hvørja ferð samráðingar hava verð.



5. jan.
Føroya Fiskimannafelag fær nýggjan formann. Erlendur Patursson, ið hevur verið formaður í 15 ár, varð ikki afturvaldur til formann í Føroya Fiskimannafelag.
Valevnini vóru trý hesa ferð, Erlendur Patursson, Tórshavn, Óli Jacobsen, Norðagøtu, og Johan Hendrik Joensen, Sumba. Óli Jacobsen varð valdur við 500 atkvøðum. Erlendur Patursson fekk 464 og J. H. Joensen 56 atkvøður, meðan 26 seðlar vóru ógildugir. Tilsamans 1145 fiskimenn greiddu atkvøðu.

*Soleiðis skrivaði »Árið ið fór« í 1971 um formansvali í Fiskimannafelagnum*

Óli hevur dugað sera væl at sæð fiskivinnuna sum eina heild. Hugsaði sjálvandi fyri og fremst um umstøðurnar hjá finskimonnum, men dugdi samstundis at seta seg inn í umstøðurnar hjá teimum, sum róku skipini. Stóð til dømis illa til hjá einum skipabólki eina tíð, so vísti hann rættiliga síni evni frá fiskimannafelagsins síðu, og var við til at bjarga heilum skipabólkum og manningum burtur úr kreppu. Hetta kom seinni at hava ómetaliga stóran týdning fyri alt okkara samfelag. Hyggið bara eftir t. d. uppisjóvarflotanum í dag.

Óli, nú tú leggur frá tær, skalt tú hava stóra tøkk fyri farna tíð, eisini tá vit ikki vóru samdir.

Tú hevur rist títt navn í ta føroysku fiskivinnusøguna sum tann fiskimannafelagsformaðurin, ið gjørdi megnar avrik fyri tann føroyska fiskimannin, og fyri alt okkara samfelag.

Vónandi fara landsins myndugleikar í framtíðini at gera nyttu av allari tínari vitan um fiskivinnu bæði innan- og uttanlands.

Yvir og farin.

## Lítil live spurningur til live Fyribyrgingarráðið

JONHARD MIKKELSEN



At vera fiksur á enskum í einum føroyskum teksti ber boð um málsligt hjálparloysi. Fyribyrgingarráðið hevur nýggja lýsing í bløðunum, sum sigur: Farvæl *live* tubbak

Tað er møguliga so cool at leggja av at roykja nú á døgum, at vit nú mugu siga frá broytingini á enskum. Trupulleikin er tann, at vit eru mong, ið ikki duga at lesa hetta og skilja ikki, hvat tit meina. Tí seti eg tykkum spurningin:

FÆRVÆL *live* TUBBAK ella: farvæl LIVE tubbak. Hvat merkir tað?

Ein vanligur føroyskur lesari – sum situr við føroyskum blaði og lesur føroyskt - spyr seg sjálvan: er LIVE ein stytting fyri eitthvørt fyribrigdi, eg ikki kenni, ella er tað kanska ein avvenjingarháttur?

Ella er hetta eitt enskt orð, onkur hevur kroyst niður ímillum føroysku orðini?

Um so er, at hetta er enskt, verður spurningurin: Er hetta sagnorðið “live” í boðshátti og framborið [liv]. Ella er hetta enska lýsingarorðið “live” – framborið [laiv]?

Í fyrra førinum kundi føroyska týðingin – lesarin skal jú týða – verið henda: “Farvæl – liv – tubbak”. Í seinna førinum: “Farvæl livandi tubbak?”

Í báðum førum verður hetta eitt sárt slit, sum í ringasta føri kann verða fatað soleiðis: Færvæl lív og alt livandi – góðan morgun steindeyða tilvera við ongum royki.

Farvæl er hjáorð, og tú kanst ikki fáa eitt lýsingarorð at siga nakað um hjáorð. Soleiðis er málið skipað.

Einasti tulkingarmøguleiki er tí, at enska orðið “live” sum lýsingarorð leggur seg at “tubbak” og hvat merkir tað so? Tað er ilt at lýsa tilverunnar innasta kjarnuorð “live” við øðrum enn góðum og hálovandi orðum. Var tað ætlanin?

Tað gongur skjótt at týna burtur av føroyskum nú. Tá ið ung fólk skulu siga frá sínum meiningum og kenslum, sleingja tey út eitthvørt fikst enskt orð, sum í roynd og veru als ikki sigur, hvat tey halda ella kenna.

Við sjeymílaferð víðka vit ein gráan geira av málsligum høpisloysi um okkum. At almennir stovnar apa seg eftir teimum, ið standa fyri hesi broyting, líkist ongum. Hetta er málslig ómegd, ið almennir stovnar ikki eiga at fjeppast uppií.

Men kanska er tað ikki annað enn væntandi, tá ið okkara egni almenni fjølmiðil slóðar fyri og hvønn morgun endurgevur kut úr onkrari óviðkomandi enskari ella amerikanskari tíðindasending fyri 20- 30 áum síðan, og bregdar hana inn í føroysku morgunsendingina. Er tað fyri at lynna undir og gera skiftið til enskt so lagaligt sum til ber? Ella bara fullkomiliga ómotiverað cool?

Eru tað tær ónollurnar, aðrir almennir stovnar taka til sín nú? Royna allir almennir stovnar eins og útvarpið at tekkjast øllum teimum, ið málsliga eru so illa kálvfødd, at føroyska orðafeingið verður skert til 2000-3000 orð? Tey, sum Jógvan í Lon og Jógvan Jespersen siga verða slept upp á fjall, tá ið upplesari í útvarpinum sigur seksti og ikki trýss?

Teksturin er annars murrandi fullur í feilum, men hvat merkir slagorðið ella herrópið í nýggja átakinum?

## Virðisbrævamarknaðurin rindar vinningsbýti

VIRISBRØV

Virðisbrævamarknaður Føroya Pf. hevði aðalfund 26. februar 2007, har roknskapurin 2006 og býti av yvirskoti vórðu góðkend eins og tveir nevndarlimir vórðu afturvaldir.

Felagið hevði eitt avlop eftir skatt uppá 8,7 mió kr í 2006. Tað hevði hall uppá 0,4 mió kr av vanligum rakstri, men hevði avlop av figgjarpostum uppá 10,4 mió kr og rindar 1,3 mió kr í virðisbrævaskatti.

Góða rakstrarúrslitið er úrslit av strategiska samstarvinum við Kauphøll Íslands. Sum partur í samstarvinum keypti VMF í 2004 4,4% av Eignarhaldsfélagnum Verðbréfaþingi hf., sum átti Kauphøllina, frá íslendska figgjarmálaráðnum fyri 1,3 mió kr. Svenska partafelagið OMX, sum rekur børsarnar í Svøríki, Danmark, Finlandi og baltisku londunum, keypti 30. november 2006 Eignarhaldsfélagið Verðbréfaþing hf. lutvíst við umbýti av partabrøvum og lutvíst við peningaútgjaldi. VMF fekk meira enn 10 mió kr í vinningi av handlinum og eigur partabrøv í OMX, sum við árslok 2006 høvdu virðið 9,5 mió kr.

Felagið samtykti á aðalfundinum at rinda 1,8 mió kr í vinningsbýti til partaeigararnar, sum svarar til 20% av partapeninginum. Part-aeigararnir eru býttir í 4 bólkar: útgevarar, íleggjarar, meklarar og myndugleikar. Størstu partaeigararnir eru Fíggjarmálaráðið, sum eigur 44%, og Landsbanki Føroya, sum eigur 30% av partapeninginum. Hinir partaeigararnir, sum kunnu finnast í roknskapinum, eiga 25% av partapeninginum.

Á aðalfundinum vórðu Stefán Halldórsson og Tummas Eliasen afturvaldir í nevndina fyri 3 ár.